# Framvegis kul at brúka hjálm

**Ráðið fyri Ferðslutrygd skipaði í gjár, saman við øðrum, einum tiltaki, ið skal eggja børnum at nýta súkkluhjálm. Ein fyrsti flokkur úr Eysturskúlanum var komin oman á keiøkið við molan, har tey fingu hvør sín hjálm og sluppu at royna eina súkklubreyt**

TRYGD
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Finnur Justinussen*

– Kiwanis kom upprunaliga við hugskotinum fyri trimum árum síðani, um at geva øllum børnum í fyrsta flokki ein hjálm. Hvør ár verður so koyrt út og givið børnunum ein hjálm, og hetta er eitt av tiltøkunum í hesum sambandi, sigur Jan Nielsen, sølumaður frá MBM.

MBM stuðlar tiltakinum saman við Eimskip, Føroya Sparikassa og alt hetta gjørt í samráð við Ferðslutrygd.

– Nú hava vit so sligið okkum øll saman og skipað fyri einum tiltaki. Niels Jákup Thomsen frá Bókadeild Føroya Lærarafelags er eisini her, tí tey hava týtt eina bók úr enskum, sum er um ein drong, sum ikki nýtir hjálm.



Høgni Djurhuus, lækni á Landssjúkrahúsinum, greiddi frá, hvat hendir við høvdinum um hálmur ikki verður nýttur

## Kalt, men stuttligt

Umboð fyri allar stuðlarnar vóru á keiøkinum hósmorgunin. Fyrst segði Jón Kragesteen frá Ferðslutrygd eitt sindur um hjálmar, og síðani kom Høgni Djurhuus, lækni á Landssjúkrahúsinum og greiddi frá, hví tað er so umráðandi at nýta hjálm.

Niels Jákup Thomsen fortaldi síðani um bókina, Mick Harte var her. Hon er um ein drong, sum ikki nýtir hjálm. Hann er við í eini ferðsluvanlukku og doyr. Tað er systir Mick, sum fortelur søguna.

Tá børnini høvdu staðið og lurtað eina løtu, vóru tey eitt sindur køld. Men so fór Eli Christiansen, sum er súkklari, at vísa teimum, hvussu tey skuldu súkkla ígjøgnum breytina. Tey fingu stig fyri, hvussu væl tey kláraðu seg. Og ímeðan vórðu pylsur hitaðar, sum tey síðani fingu at eta.

Breytin var eitt sindur torfør, men børnini kláraðu seg væl. Onkur rulluskoytaði og summi súkklaðu – øll sjálvandi við hjálmi.



Børnini skuldu royna eina súkklubreyt, sum var sett upp á keiøkinum



1. flokkur úr Eysturskúanum fekk í gjár hjálmar, sum tey skulu brúka tá tey súkkla








# Vit rinda ikki fyri savnsrøktina

**– Velja kommunurnar, sum eru í okkara kommunufelag, at rinda fyri savnsrøktina, blandar felagið seg ikki uppí. Tað er upp til tær, men sjónarmiðið hjá Føroya Kommunufelag er enn sum áður, at vit ikki eiga at rinda fyri savnsrøktina, sigur Jacob Vestergaard, formaður í Føroya Kommunufelag**

SAVNSRØKTIN
*Turið Kjølbro*

At Kommunusamskipan Føroya hevur skrivað undir semju um savnsrøktina og harvið staðfestir at rinda helmingin av, hvat hendan kostar í samsýning til lærarar, fær ikki hitt stóra kommunufelagið at vika seg og gera tað sama. Føroya Kommunufelag hevur nevniliga ongar ætlanir um at viðurkenna, at kommunurnar eiga ábyrgdina av at rinda fyri savnsrøktina.

– Vit eru ikki partur av málinum og eru annars grundleggjandi av teirri fatan, at málið snýr seg um lønir til lærarar og hana eigur landið at rinda, sigur Jacob Vestergaard, formaður í Føroya Kommunufelag.

Spurdur um, hann slær seg til tols við, at serstovur og amboð á øllum skúlunum í kommununum, sum felagsskapurin varðar av, ikki verða røktar, sigur Jacob Vestergaard, at hesa ábyrgdina eigur Mentamálastýrið og ikki kommunurnar.

– Velja kommunurnar, sum eru í okkara kommunufelag, at rinda fyri savnsrøktina, blanda vit okkum ikki uppí. Kommunurnar hava altíð verið ymiskar á máli um hendan spurningin, men mær vitandi eru tær flestu samdar við niðurstøðini hjá felagnum. Sjónarmiðið hjá Føroya Kommunufelag er enn sum áður, at vit ikki eiga at rinda fyri handan partin. Kommunurnar eiga skúlarnar og Mentamálastýrið lærararnar. At røkja serstovurnar er partur av arbeiðinum hjá lærarunum, eisini uttanveltaðir løgfrøðingar hava víst á tað, og tí eiga slíkar uppgávur at koma upp í samráðingum millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið. Vit vilja hava greiðar linjur. At býta lønina hjá lærarum ímillum land og kommunur, er bara at fløkja viðurskiftini.



– Vit vilja fegin vera við til at loysa upp fyri hesum spurninginum, men tað kemur ikki uppá tal, at Føroya Kommunufelag viðurkennir, at vit eiga at gjalda lærarum løn fyri at røkja serstovurnar, sigur Jacob Vestergaard.

Álit er gjørt, sum leggur upp til, at kommunurnar rinda fyri savnsrøktina. Formaðurin í Føroya Kommunufelag vísir á, at teirra felagsskapur ikki hevði nakað umboð í hesum bólkinum og vil tí ikki kennast við tey tilmæli, sum komu burturúr.

– Vit vilja fegin vera við til at loysa upp fyri hesum spurninginum, men tað kemur ikki uppá tal, at Føroya Kommunufelag viðurkennir, at vit eiga at gjalda lærarum løn fyri at røkja serstovurnar, sigur Jacob Vestergaard.

Í dag er fundur í Føroya Kommunufelag. Umboð fyri Mentamálastýrið verða við, har savnsrøktin møguliga kemur á dagsskránna.

# Semja undirskrivað um savnsrøktina

**– Vit eru nøgd við, at tað endiliga er staðfest, at lærarar skulu hava samsýning fyri at røkja serstovur. Men vit eru ikki nøgd við, at nakrar serstovur ikki eru umfataðar av semjuni, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag**

SAVNSRØKTIN
*Turið Kjølbro*



*Fyrstu vóru próvtøkuuppgávurnar hóttar, síðani dømingin, nú letur til, at næmingar sleppa til roynd í øllum góðum.*

Beint áðrenn evsta mark, sum var sett at vera mikudagin, eydnaðist Føroya Lærarafelag, Mentamálastýrinum, Kommunusamskipan Føroya og Fíggjarmálastýrinum at semjast og skriva undir avtalu um savnsrøktina í fólkaskúlanum. Avtalan ber í sær, at lærarar, sum arbeiða á serstovum, fáa samsýning fyri at røkja tær. Samsýningina rinda kommunurnar og landið helvt um helvt, eins og lagt varð upp til í álitinum, ið er gjørt um savnsrøktina.

Savnssamskipari skal veljast á øllum skúlum, har serstovur eru. Hesin fær løn fyri arbeiði sítt á tí lønarstigi, hann er, hvørt hálva ár. Arbeiðið verður ikki lønt við niðurskurði í tíð. Uppgávurnar hjá savnssamskiparanum eru bæði av røktarligum og námsfrøðiligum slag, og útreiðslurnar til arbeiðið verða lutaðar sundur millum land og kommunur við helvtini til hvønn part. Mentamálastýrið skal í samráð við kommunustýrini og skúlaleiðslurnar góðkenna og gera eitt yvirlit yvir øll serhøli í landinum innan 1. sept. 2002.

Talan er um níggju serstovur, sum verða umfataðar av semjuni. Tær eru træsmíð, alis- og evnafrøði, tilevning, handarbeiði, náttúru/tøkni, lívfrøði, motorlæra, ítróttur og tónleikur. Samsýningin verður latin í lutfalli við næmingatalið á skúlunum, tað vil siga, at serstovurnar á teim størstu skúlunum fáa mest, meðan samsýningin minkar niðureftir samsvarandi skúlastødd.

Forkvinnan í Føroya Lærarafelag, Elsa Birgitta P. Petersen, er nøgd við, at semja loksins er fingið um hetta stríðsmálið.

– Vit eru nøgd við, at tað endiliga er staðfest, at lærarar skulu hava samsýning fyri at røkja serstovur. Men vit eru ikki nøgd við, at nakrar serstovur ikki eru umfataðar av semjuni, sigur Elsa Birgitta P. Petersen.

Ein serstova, sum verður hildin uttan fyri semjuna, er bókasavnið. Fíggjarmálastýrið vil ikki vita av, at bókasøvn koma undir avtaluna av grundum, sum forkvinna í Føroya Lærarafelag ikki skilir.

– Fíggjarmálastýrið metir ikki, at arbeiðið, sum skúlabókavørðurin ger er røkt av savni, men heldur er beinleiðis undirvísing av næmingum. Vit vórðu noydd at góðtaka hesa útmeldingina frá Fíggjarmálastýrinum. Gjørdu vit ikki tað, kom als eingin semja. Men vit sleppa ikki bókavørðunum so, tí vit fara at miðja eftir at fáa arbeiðið hjá bókavørðunum roknað inn í arbeiðstíðina, sigur Elsa Birgitta P. Petersen.

Blokadan av próvdømingini í 9. og 10. flokki er nú tikin av. Somuleiðis er blokadan av savnsrøktini tikin av, men bara í teimum kommunum, sum eru limir í Kommunusamskipan Føroya, tað vil siga í seks teim størstu kommununum í landinum umframt Kirkjubøar kommunu, sum telist millum tær smæstu í fólkatali. Føroya Lærarafelag noktar nevniliga framvegis limum sínum at røkja serhølir í skúlunum í teimum kommunum, sum eru limir í Føroya Kommunufelag.

Semjan verður løgd út á álitisfólka- og limaráðstevnunar í Samhøll og á heimasíðu Føroya Lærarafelags.

Eisini Óli Holm, landsstýrismaður í skúlamálum, er nøgdur við, at semja loksins er fingin um savnsrøktina. Í tíðindaskrivi sigur hann, at hann er sera væl nøgdur við, at eitt nærum 30 ára gamalt mál er komið uppá pláss.